# Sjúrður Hentze Rasmussen 65 ár



Hósdagin tann 1. november verður Sjúrður Hentze Rasmussen 65 ár.

Sjúrður er føddur og uppvaksin í Havn. Foreldur hansara vóru Tomasia og Petur Rasmussen. Sjúrður hevur fýra systkin, tey eru tvíburasysturin Sólrun, Marin, Petur Sigurd og Martha.

Sjúrður, sum er útbúgvin skipsførari, sigldi hjá Mærsk í umleið 10 ár, áðrenn hann fór í starv hjá Fiskasøluni sum sølumaður, har hann gavst í ár, eftir 35 ár í starvi.

Sjúrður hevur nógv ítriv. Honum dámar ógvuliga væl at dansa og er limur í bæði Dansifrøði og Tøkum lætt. Á kvøldskúla lærir hann at skera í træ, og hevur hann gjørt nógvar grindaknívar og fjallstavar. Eisini hevur hann í fleiri ár spælt dart saman við vinmonnum fyri ikki at gloyma allar sunnudagarnar, tá Sjúrður er í Gundadali fyri at stuðla HB, har hann hevur staðið í øllum veðri og selt atgongumerkir.

Sjúrður eigur 4 børn, tey eru Ingi, Birgit, Kári og Heri. Harumframt hevur hann 9 abbabørn.

Dagurin hjá Sjúrða verður hildin leygardagin tann 3. november í kantinuni hjá PM heilsølu, Hoyvíksvegur 74, har øll eru hjartaliga vælkomin milum kl. 10 og 15 til brunch.

Góðu Sjúrður og Sólrun, vit ynskja tykkum hjartaliga tillukku við degnum.

**Heilsan familjan**

---

# 70 ára dagur



1. november er Virgar Dalsgaard sjútugur. Áramál, ið setur mannin í røðina av teim, ið rokkið hav høgan aldur – eftir gamlari meting.

Virgar er einarin. Hann vaks upp í Havn, síni fyrstu barnaár tó í Skálavík. Nógv er í manninum, ið peikar á andsmennini av Mølini og av Sandi, hagan mamman var. Foreldur hansara vóru Marianna f. Hjalt og Tórur Aksalson Dalsgaard úr Skálavík.

Virgar flutti við húski til Danmarkar í 60-unum, var giftur Honnu f. Nolsøe úr Klaksvík. Hann helt fram sum fólkaskúlalærari øll árini – og er virdur sum hollur málvísi í yrki sínum. Ikki skal leggjast burturúr slóðbrótandi arbeiði hansara, sum málvísi undirvísarin hjá børnunum í føroyskum máli í Keypmannahavn.

Men tað er sum pennaførarin, Virgar ikki verður tikin. At siga hin einasti av monnum, sum hevur verið førur fyri, svart upp á hvítt, at seta upp á prent søguna um tað týðum ótespiliga stríð, ið var, serliga í krígsárunum, tá Javnaðarflokkurin stóð mestum púra einsamallur fyri sjálvsøgdu virðunum, ella krøvunum, sum allir flokkar á tingi í dag krampaktiga kanna sær sum teirra ”fremsta mál! – at verja vælferð borgaranna. Hevur nakar í skrift og talu stríðst, so hesin veruleikin stendur rimmarfastur og ósvitaliga aftur og aftur vísir á og staðiliga prógvar veruleikan uttan nakað sum helst kávalæti, so er tað Virgar, einsamallur.

Tað sum Virgar hevur lagt fyri ein dag um politisku søguna fer víst at verða brúkt í komandi tíð, hann hevur evnini at lýsa tilburðir og málini uttan nakað sum helst kávalæti.

Nakni veruleikin er mangan illa lýddur og toldur. Og sum frálíður er víst, at ”tað sum Virgar skrivaði, tað er púra rætt og satt”.

**Jákup Lindenskov**

---

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Poul Anker Hansen** fer úr Evangelliðhúsinum leygardagin klokkan 13

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði maður, pápi og abbi, verfaðir og beiggi okkara

**Pauli Reinert Petersen**
Saltnes

andaðist á Ríkissjúkrahúsinum
týsdagin 30. oktober 62 ára gamal.
Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum leygardagin
3. november kl.16.30 í Fríðrikskirkjuna.
Jarðarferðin verður sunnudagin 4. november kl.14.00.

*Fyri tey, ið varða av*
**Judy, Sonja, Hans Jacob, Poula og Dávid**

*Tey, ið vilja minnast Paula við blómum ella kransi, kunnu lata eina peningagávu til Fríðrikskirkjuna á konto í Føroya Banka.*

---

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum gleddu meg á 90 ára degnum, við gávum, blómum, uppringingum og fjarritum.
Eina hjartans tøkk til familjuna, sum gjørdi dagin so hugnaligan fyri meg.

**Bestu heilsanir**
**Jens Pauli Joensen (Boy)**

---

**Dagurin**
**2. november. Bibiana**, deyð umleið ár 1367. Dóttir ein keisarligan embætismann, Flavianus. Tá ið tað upp, at dótturin var kristin, vórðu øll í húsinum tikin av døgum. Bibiana stendur summastaðni skrivað Viviana.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

-har tað hendir

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin